VIÐMERKINGAR

Tjóðveldisupplýsing

Dan R. Petersen
javnaðarmaður

Í mínum starvi í Norðurlandaráðnum hevur tað mangan undrað, hvussu væl mínir starvsfelagar hava kent til føroysk viðurskiftir og ta politisku støðuna her heima. Hetta er galdandi fyri næstan allar. Norðmenn, sviar, finnar, danir, grønlendingar og álendingar. Teir kenna dagsins politikk og tað kollsigldu fullveldisætlanina vegna tvørrandi undirtøku í fólkinum.

Tveir bólkar hava tó lítið og einki skilt. Tann vinstrasosialistiski bólkurin har Høgni Hoydal kennir seg heima í og so limir í tí íslendsku sendinevndini. Teir tykjast at halda, at ein veldigur meirluti er fyri loysingini, og at danir ikki eru at tosa við. Tað var eisini íslendarin Steingrim Sigfusson frá vinstrasosialistunum, sum á ársfundi í Reykjavík á heysti 2000 royndi at draga fullveldismálið inn í Norðurlandaráðið, men tað fekk eg sett ein stoppara fyri.

Høgni Hoydal hevur roynt at bilt donskum avíslesarum inn, at yvir 70% av føroyingum ynsktu loysing. Hetta vóru so grov ósannindir, at eg ikki væntaði, at tey kundu yvirgangast. Men eg bleiv klókari.

Ein vinmaður gav mær eina grein, sum hevði staðið í tí íslendska Morgunblaðnum 16. januar í ár. Hon stendur her á síðuni í umsettum líki. Sosialurin og undirritaði hava upprunagreinina, og hon kann eisini lesast á bókasavninum. Hvat er endamálið, at lúgva so grovliga fyri fólki, sum ikki kann eftirkanna slík tíðindir.

Sambært Dimmalætting 23. februar segði Anders Fogh Rasmussen statsministari í Fólkatiginum nú um dagarnar: "Hatta orðaskiftið hoyrir heima í Føroyum, og trupulleikin eigur at verða loystur í Føroyum. Tórbjørn Jacobsen eigur ikki at gera Fólkatingið og stórnina til trupulleikan. Hann kann reka sítt kríggj í Føroyum heldur enn í Fólkatinginum."

Sum eitt slag av modernaðum talibanum, sum hava tapt tað nationalistiska slagið í heimlandinum, føra tjóðveldismenn eitt verbalt kríggj uttan fyri landamark. Tað er lítið virðiligt, og tað er ótrygt at lata okkara framtíð í teirra hendur.

Men gerið tykkum nú tann beina at lesa ta íslendsku greinina, sum byggir á upplýsingar frá Karsten Hansen landsstýrismanni, og metið sjálvi um trúvirðið.

Morgunblaðið 16. januar 2002:

Karsten Hansen fíggjarmálaráðharri Føroya á almennari vitjan í Íslandi:

Nú stundar til føroyskt sjálvstýri

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri Føroya, sigur at verður farið undir at útvinna olja á føroyskum landgrunni so at vinningur kemur burtur úr, er hugsandi at Føroyar gerast sjálvstøðugar innan fýra ár.

Karsten Hansen og kona hansara Gullbritt Hansen komu til Íslands í fyrradagin við fylgi, boðin av Geir H. Haarde fíggjarmálaráðharra, sum tók við líknandi innbjóðing til Føroya í fjør summar. Ráðharrarnir hava síðani tosað saman um ymisk felags mál, og kunnað hvønn annan um búskaparmál og skattamál.

Fyri knøppum ári síðani samtykti meirilutin í løgtinginum, sum stendur aftanfyri føroyska landsstýrinum – Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin – uppskot landsstýrisins um "sjálvsstýri føroyska fólksins" og verður tað sett í ver, gerast Føroyar fullveldis ríki.

Karsten Hansen sigur, at tað stendur væl til í føroyska landskassanum, og seinastu árini hevur verið møguligt at leggaj eina fitta upphædd til síðis. Danski fíggjarligi stuðulin til føroyska landskassan var 980 milliónir dkr. í fjør (knappar 12 milliardir íslendskar kr.), men av hesum settu føroyingar 630 milliónir dkr. í ein varagrunn. Sama var gjørt trý ár frammanundan. Fíggjarligi studningurin eigur nú at minka stigvíst, og er hann umleið 35% minni í ár enn í fjør, ella um 630 milliónir dkr.

Karsten Hansen fjármálaráðherra Færeyja í opinberri heimsókn á Íslandi

Styttist í sjálfstæði Færeyja

Í farna ári funnu menn olju í føroyskum øki. Karsten Hansen sigur serfrøðingar meta at oljan kann útvinnast og at tað kann byrja innan trý ár. Verður hetta so, skundar tað undir lyftini um føroyskt sjálvstýri. Landsstýrið hevur víst at tí hevur ikki tørvað meir enn ein lítlan part av figgjarveitingini úr Danmark seinastu fýra ár, og verður vinningur av oljuframleiðslu, kemur hann í staðin fyri hesa veiting. Hann ásannar at góðar tíðir eru í Føroyum. Har er eingin inflatión, og umleið 85% av íbúgvunum vilja sjálvstøðu frá Danmark, men summir stúra fyri at føroyingar ikki kunnu vera fíggjarliga studningin frá dønum fyri uttan.

Føroysku gestirnir vitjaðu íslendskar fyritøkur og stovnar í gjár, og í dag fundast Karsten Hansen við tollstjóran í Reykjavík. Vitjanin endar í morgin.

Sambandspolitikkurin styrkir Føroysku tjóðina

Tummas Eli Høj Joensen
Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy.

Lesa vit grein 1 í stevnuskrá Sambandsfloksins, sígga vit, at tað eru ikki bara repuplikanarar, ið brúka orðið tjóð í síni politisku stevnuskrá. Nei, Sambandsflokkurin er ein flokkur, ið altíð hevur viðurkent føroysku tjóðina, og hvat skuldu vit annað gjørt, tá vit hugsa um, okkara stolta fólk! Latum okkum endurgeva grein 1 í stevnuskránni soleiðis, at øll tann føroyska tjóðin kann lesa, hvussu vítt hendan strevnuskráin fevnir !!

Menning av Føroysku tjóðini

Grein 1: Sambandsflokkurin hevur til aðalmál í rikisfelagsskapinum við Danmark, at arbeiða fyri frílintari og hollari menning av Føroysku tjóðini, stjórnarliga og fíggjarliga og vil á øllum økjum reka ein framtakshugaðan politikk á kristiligum mentunargrundarlagi.

Í grein 1 verður fyri tað fyrsta sligið fast, at Sambandsflokkurin arbeiðir fyri at varveita ríkisfelagsskapin, eins og tað verður hildið fram, at flokkurin innanfyri ríkisfelagsskapin vil arbeiða fyri hollari menning av Føroya fólki, stjórnarliga, fíggjarliga og mentunarliga.

Sambandsmenn eru framskygnir

Sambandsflokkurin var við til at orða og samtykkja Heimastýrislógina, og hann er tí eisini til reiðar at gera tær stjórnarligu broytingar, ið tæna Føroya fólki best (Føroysku tjóðini best). Vit kunnu siga, at var tað ikki soleiðis, at Sambandsflokkurin hevði samtykt heimastýrislógina, so var eingin av hesum yvirtøkunum gjørligar, ið longu eru framdar. Tí kunnu vit staðfesta, at Sambandsmenn ikki hava verið so lítið framskygnir, tá ið Heimastýrislógin var gjørd.

Sambandsflokkurin og sjálvberandi búskapur.

Føroyar eru eitt lítið land sammett við onnur lond og vit føroyingar hava (enn í hvussu so er), sjógvin sum størsta landsbúskaparliga álit. Sambandsflokkurin veit, eins og allir aðrir politiskir flokkar, at skulu vit hava eins góð livilíkindir sum í øðrum framkomnum londum, verður hetta trupult at klára fíggjarliga sjálvir, enn ið hvussu so er. Men; tann tíðin kemur og verður hetta skjótast framt undir Sambandsflokksins leiðslu, tí Sambandsflokkurin hevur eisini sum aðalmál, at fremja góð arbeiðsviðurskiftir fyri vinnulívið.

Hetta skal verða so, tí vinnulívið er tað ið skal framleiða okkum til sjálvberandi búskap.

Eftir at hava lisið hetta kann eingin ivið verða um, at vilt tú Føroysku tjóðini best, so er at sleppa Sambandsflokkinum frammat við næsta val.

SUPER DEKK

Søkir eftir røskum og dugnaligum bilsmiði ella persóni við líknandi førleika at byrja skjótast gjørligt.

Løn: Sambært avtalu.

Um tú ynskir at vita meir um starvið, kanst tú venda tær til Super Dekk Sp/f tlf. 314975 ella 214975, og tosa við Fríðrik Bláhamar.

Sp/f SUPER DEKK
Hoyvíksvegur 66 · Postboks 3012 · FO–110 Tórshavn
Tlf.: (+298) 314975 · Fax: (+298) 318172 Fartlf.: (+298) 214975
e-mail: superdek@post.olivant.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3320
Navn: P/F Suðurís
Adressa: 850 Hvalba
Kommuna: Hvalbiar Kommuna
Stovningardato: 29.01.2002
Viðtøkudato: 29.01.2002
Kapitalur: Kr. 3.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 3.000.000,00 til kurs 100.
Stovnarar:P/F Maru Seafood, 700 Klaksvík (P/F 2727) og Íløgufelagið í Hvalba, 850 Hvalba (P/F 3322).
Nevnd: Jóhan Dávid Joensen, undir Hæddini 7, 700 Klaksvík (formaður), Mikkjal Hammer, 850 Hvalba og Páll Joensen, Rygsvegur 5, 700 Klaksvík.
Stjórn: Jóhan Páll Joensen, Rygsvegur 5, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: P/F KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskaframleiðslu, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 22. februar 2002

Kristin Balle

AJOUR ✓
BÓKHALD og ROKNSKAPUR

- fært tú stress av dungunum?
- ov lítla tíð til kundar og familju?

so set teg í samband við Ajour, vit kunnu taka okkum av tygara:

- bókføran og avstemman
- mvg uppgerðum
- lønum og avrokningum
- roknskapi
- rakstrar- og fíggjarætlanum
- vit kunnu heinta skjølini skild ella óskild

Kundarnir hjá Ajour eru:

- handverksmeistarar
- handlandi
- minni framleiðsluvirkir
- tænastuvirkir
- smærri kommunur

Páll Larsen
Norður í gerði 11
530 Fuglafjørður
Tel: 444320
Far: 218320
larsen@post.olivant.fo

PS: Ein ikki AJOURførd roknskaparskipan gevur onga fráboðan um gongdina

Føroyski happadrátturin

1. dráttur
drigin 18.02.2002

Størstu vinningarnir fullu soleiðis:

30.000 kr.	11231	1/1 seðil. - sølustaður: Skála
25.000 kr.	7551	1/1 seðil - sølustaður: Vágur
15.000 kr.	8057	1/1 seðil - sølustaður: Havn
5x10.000 kr.	2067	1/1 seðil - sølustaður: Vestmanna
	5708	1/1 seðil - sølustaður: Sandavágur
	7804	1/1 seðil - sølustaður: Tvøroyri
	9981	1/1 seðl. - sølustaður: Havn
	106881	1/1 seðl. - sølustaður: Havn
7x5.000 kr.	2234	1/1 seðil - sølustaður: Klaksvík
	6015	1/1 seðil - sølustaður: Vestmanna
	7970	1/1 seðil - sølustaður: Hvannasund
	9261	1/1 seðl. - sølustaður: Skálavík
	10266	1/1 seðl. - sølustaður: Kollafjørður
	12019	1/1 seðl. - sølustaður: Havn
	12249	1/1 seðl. - sølustaður: Viðareiði

3000 kr.	972	1490	1616	1622	5261	6037	6667	8225
	10905	13924						
2000 kr.	840	1419	2505	2512	3492	4128	4438	5371
	5639	5869	5892	5989	6195	6198	6821	7395
	7504	10049	11237	11361	11370	11935	11965	12821
	13580							
1000 kr.	193	207	263	272	308	692	1076	1703
	1769	1957	2030	2248	2355	2514	3018	3157
	3388	3418	3463	3491	3583	3784	3998	4062
	4323	4370	4428	4538	4909	5063	5408	5563
	5670	5737	6153	6379	6722	6976	7372	7845
	8173	8414	8424	8609	8619	8708	8925	9034
	9040	9136	9315	9643	9873	9960	10402	10692
	10705	10857	11018	11062	11071	11479	11778	12067
	12129	12240	12414	12920	12958	13117	13582	13814
500 kr.	177	201	442	468	498	705	1235	1328
	1336	1342	1534	1538	1580	1613	1665	1838
	1914	1920	2054	2066	2111	2148	2241	2281
	2394	2772	2780	2804	3055	3207	3299	3350
	3419	3478	3622	3691	4188	4236	4372	4615
	5008	5026	5070	5113	5147	5173	5285	5357
	5501	5507	5615	5646	5658	5740	5982	6213
	6408	6680	6814	7049	7063	7105	7265	7569
	7609	7720	7760	7828	7983	8132	8175	8246
	8314	8327	8412	8462	8538	8764	8789	8975
	9048	9335	9401	9613	9713	9781	9843	10151
	10353	10535	10618	10660	10831	10864	10968	11088
	11177	11190	11201	11321	11566	11573	11606	11645
	11814	11868	12132	12175	12429	12625	12746	12869
	13038	13157	13243	13354	13400	13499	13633	13702
	13787	13793	13849	13901	13978			

Vinningarnir verða útgoldnir beinanvegin við frádrátti av 15% gjaldi til landskassan, av tí parti av vinninginum, sum er omanfyri 3.000 kr.
Vinnararnir verða bidnir um at venda sær til happadráttarseljarar sínar.
Vinningur má avheintast áðrenn 6 mánaðar frá dráttardegnum.

Føroya landsstýri
18.02.2002
(Happadrátturin)

Dráttarlistin er eisini á heimasíðuni hjá Elektron: http://www.elektron.fo

DVEYLAN
Gólv- og vegg vask

- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

Tygum eru vælkomin at ringja og fáa eitt óbindandi tilboð.

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75

Sosialurin

Fiskivinnublaðið 2002

Í Sosialinum 13. mars verður stórt innlegg um fiskivinnuna. Tað fer at snúgva seg um okkara fiski-, ali- og sjóvinnu, bæði á sjógvi og landi.

Umframt vanligu útbreiðsluna verður Sosialurin hendan dagin eisini sendur øllum reiðaríum og skipsmanningum umframt at blaðið verður ókeypis at fáa á Fiskivinnuráðstevnuni "Kappingarføri og lønsemi hjá fiskivinnuni" sum Farec skipar fyri á Hotel Føroyum 15. mars. So útbreiðslan 13. mars verður nógv størri enn vanligt.

Tí heita vit á tykkum, sum selja/umboða skipsútgerð og útgerð til sjóvinnuna annars, um at lýsa í hesum blaðnum, so hendan útgávan gerst uppaftur meira áhugaverd.

Freistin fyri at fáa eina lýsing við er mánadagin 4. mars.

Hetta er eitt gott høvi at kunna viðskiftafólk tykkara um tað, tit selja/umboða og tær tænastur, tit veita innan høvuðsvinnuna.

Tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, eru vælkomar at venda sær til okkum og fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820 og tosi við

Finnbjørg Nattestad
Marknaðardeildin
finnbjorg@sosialurin.fo